UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **29. juni 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-61**

Svar

upp á

fyrispurning frá Heðin Mortensen, løgtingsmanni, nr. 105/2019, eftir Tingskipanini § 52a Fyrispurningur viðvíkjandi fornminnum og friðaðum bygningum, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin nakra ætlan um friðaðar bygningar, sum hava almennan áhuga at vitja og síggja, til dømis bygningar og umhvørvi við serbygningum so sum í Kirkjubø, úti í Koltri og prestagarðurin í Sandagerði?
2. Eru aðrir líknandi friðaðir bygningar kring landið, sum kundu havt almennan áhuga at vitja og síggja?
3. Hvat inniber tað, at bygningar eru friðaðir, og at fólk býr har? Er reglugerð fyri hesum, og veitir landskassin fígging til viðlíkahald og rakstur?
4. Er eftirlit við friðingini og røkt av hesum søguligu bygningum - ogn Føroya fólks?
5. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at stuðla søvnum og bygningum kring landið, sum lýsa og varðveita siðsøgu og mentanararv okkara?
6. Ætlar landsstýrismaðurin at lata upp fyri føroyingum og ferðafólki at vitja og síggja friðaðar bygningar, og um so er, hvussu ætlar landsstýrismaðurin at gera tað?
7. Eru nakrar ætlanir og framtíðar nýhugsanir um prestagarðin í Sandagerði, Kirkjubø og Koltur? Verður peningur settur av til hesar møguligu verkætlanir?

Svar

Til 1: Tað er Tjóðsavnið, sum umsitur friðaðu bygningarnar hjá landinum, og fleiri størri verkætlanir eru í gongd í løtuni.

Í Kirkjubø verður arbeitt eftir eini ætlan, ið er lýst í áliti um Kirkjubømúrin frá 2008, og sum fevnir um øll fornminnini frá miðaldar bispasætinum í Kirkjubø. Verkætlanin fór í gongd í 2012, og síðan hevur fyrst og fremst verið arbeitt við at umvæla Kirkjubømúrin. Nú umvælingin av múrverkinum í Kirkjubømúrinum er komið væl ávegis, er í ár farið undir at umvæla múrverkið úti í Líkhúsi. Játtanin til Kirkjubømúrin hevur seinastu árini verið 1 mió. kr. árliga.

Í Koltri er mest víðfevnda friðing av bygningum og umliggjandi øki í landinum. Arbeitt hevur verið í nógv ár við umvælingum av bygningunum heima í Húsi. Í 2013 varð avgerð tikin um at

taka Koltur úr festiskipanini við tí endamáli at gera eina antikvariska serskipan fyri oynna. Um sumrarnar hava nógv fólk vitjað í Koltri.

Friðaði prestagarðurin í Sandágerði hevur síðani 1996 verið leigaður út sambært leigusáttmála millum landsstýrið og privatan leigara. Í leigusáttmálanum er ásett, at landið stendur fyri viðlíkahaldinum av friðaða havanum. Landsverk stendur fyri viðlíkahaldinum av bygningunum, og hevur áður eisini staðið fyri viðlíkahaldinum av havanum í Sandágerði. Tíverri hevur einki viðlíkahald verið av havanum seinastu 3 árini, men í summar verður havin settur í stand aftur.

Tjóðsavnið arbeiðir eisini við øðrum verkætlanum at umvæla og varðveita friðaðar bygningar og fornminni. Í ár hevur verið arbeitt við at umvæla ein av vollunum við Havnar skansa. Vollarnir eru í ringum standi, og neyðugt er við stórum ábøtum komandi árini.

Arbeitt hevur eisini verið við varðveiting av hvalastøðini við Áir í nøkur ár, og nú er farið undir at skipa betri umstøður fyri tey vitjandi. Tjóðsavnið arbeiðir eisini við at umvæla og varðveita fleir aðrar bygningar kring landið.

Arbeiðið við friðaðu fornminnunum og bygningunum fer fram innan teir karmar, ið fíggjarlógin setur, og alt kann ikki verða gjørt í senn.

Til 2: 88 bygningar eru skrásettir á listanum yvir friðaðar bygningar hjá Tjóðsavninum. Umframt fleiri kirkjur eru handilsbygningar, prestagarðar, bóndagarðar, gróthús, úthús, hjallar, myllur og neyst, sum hava tað til felags, at tey umboða tað besta og mest eyðkenda fyri teirra slag og tíðarskeið, og at teir tí hava týdning fyri søgu okkara.

Nakrir av hesum bygningum eru ogn hjá landinum, nakrir eru ogn hjá bygdasøvnum, aðrir eru ogn hjá stovnum og feløgum, og uppaftur aðrir eru ogn hjá privatfólki.

Afturat friðaðu bygningunum eru fornminni, sum eru friðað við lóg.

Allir hesir friðaðu bygningar og øll hesi fornminni hava almennan áhuga. Tað er tó ymiskt, hvussu langt Tjóðsavnið er komið við ymsu verkætlanunum at varðveita og miðla bygningar og fornminni, men málið er, at friðaðir bygningar og fornminni í mest møguligan mun skulu verða atkomuligir hjá teimum vitjandi, og at kunnað verður um einstøku bygningarnar og fornminnini á staðnum.

Til 3: Bygningar verða friðaðir eftir § 3 í løgtingslóg nr. 19 frá 16. september 1948 um friðan av fornminnum og bygningum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 11 frá 19. apríl 1972.

Tá bygningar eru friðaðir, hevur eigarin sambært § 6 í lógini skyldu at halda hann í góðum standi.

Krøv verða eisini sett um, at eigarin boðar Tjóðsavninum frá, um ætlanir eru um at seta arbeiði í gongd, sum ganga út um vanligt viðlíkahald.

Hevur hetta við sær útreiðslur, sum eru størri orsakað av herdum krøvum til arbeiðið, kann eigarin fáa útreiðsluøkjanina endurgoldna frá tí almenna, um hann ikki fær hetta aftur í hægri nyttuvirði.

Landið veitir ikki stuðul til rakstur, og stuðulin til viðlíkahald er avmarkaður. Í árinum 2013 - 2018 var stuðulin millum kr. 0 og knappar kr. 35.000 árliga. Stuðulin verður goldin av rakstrarjáttanini hjá Tjóðsavninum.

Til 4: Tjóðsavnið hevur eftirlit við friðaðu bygningunum og rekur teir við rakstrarjáttan hjá stovninum. Við tí endamáli at fáa meiri burtur úr og at arbeiða meiri skynsamt fyri tøku játtanina, hevur Tjóðsavnið júst sett fólk í starv at taka sær av umvæling av friðaðu bygningunum.

Til 5: Bygdasøvn kunnu fáa stuðul til rakstur av savninum og til keyp av savnsbygningum. Fleiri bygdasøvn eiga og reka friðaðar bygningar sum part av savnsvirksemi teirra. Hetta verður gjørt í samstarvi við Tjóðsavnið, sum eisini umsitur stuðulin til bygdasøvn

Til 6: Bæði føroyingar og ferðafólk hava atgongd til fleiri av friðaðu bygningunum kring landið. Eitt nú ber til at vitja flestu friðaðu kirkjurnar, og í fleiri av friðaðu bygningunum hava bygdasøvn skipað fyri framsýningum og í øðrum er matstovuvirksemi. Í teimum bygningum, ið eru í privatari ogn, er tað upp til eigaran, um skipað verður fyri, at fólk kunnu koma á gátt.

Tjóðsavnið arbeiðir áhaldandi fyri at skipa savnsvirksemi í teimum bygningum, ið savnið varðar av. Eitt nú varð hvalastøðin við Áir latin upp fyri vitjandi í fjør, og í Koltri ber til at vitja í friðaðu bygningunum har. Dúvugarðar í Saksum hava eisini opið fyri vitjandi.

Til 7: Nú verkætlanin hjá Tjóðsavninum at varðveita miðaldar fornminnini í Kirkjubø er komin so væl ávegis, verður farið undir næstu stigini, har lunnar verða lagdir undir eini skipaðari ætlan fyri Kirkjubø, m.a. í sambandi við ferðavinnuna. Hetta verður gjørt í samstarvi við bóndahjúnini á Kirkjubøargarði.

Í Koltri arbeiðir Tjóðsavnið við eini varðveitingarætlan fyri bæði náttúru og mentan. Ætlanin er at skapa betri umstøður fyri tey vitjandi, eitt nú við móttøkuhúsi, framsýningum, matstovu og setursskúla.

Prestagarðurin í Sandágerði er leigaður út til privatfólk, so í løtuni inngongur hann ikki í ætlanirnar hjá Tjóðsavninum. Tó verður friðaði havin settur í stand í summar, og í tí sambandi er hugsandi, at havin kann verða latin upp fyri vitjandi.

Umsitingin av friðaðum bygningum og fornminnum fer av rakstrarjáttanini hjá Tjóðsavninum. Harafturat eru serligar játtanir til verkætlanirnar í Kirkjubø, hvalastøðina við Áir og til Koltursætlanina. Til tær størru ætlanirnar verður arbeitt við at fáa stuðul úr grunnum.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður